# TB streyk avstað

**Við heimasigrinum á Mjølni hava Tvørakvinnurnar nú lagt seg einsamallar á odda í bestu flogbóltsdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

TB hevur sett kósina móti gullinum. Tað má vera niðurstøðan eftir dystirnar um vikuskiftið, tá flogbóltskappingin aftur fór ígongd eftir ein drúgvan vetrarsteðg.

TB hevði á heimavølli vitjan av Mjølni, og í nógvar mátar tóktist tað greitt, at júst hesin dysturin kanska fór at gerast tann mest avgerandi av øllum í gullstríðnum.

Her í blaðnum var eisini suffað nakað um, at ein slíkur dystur skuldi spælast somikið tíðliga í endaspælinum, men hvussu er og ikki, so fóru liðini bæði eldhugað undir uppgávuna.



*Talan var um ein sera skiftandi dyst í høllini í Trongisvági, har tað tó at enda eydnaðist TB at taka øll settini í dystinum móti Mjølni*

### Upp og niður

Tað gjørdist TB, sum dróg longra stráðið á vøllinum, men tær komu á ongan hátt lætt til stigini. Talan gjørdist um ein heldur óvanligan fimm-settara, har liðini fyrstu fýra settini skiftust um at hølva hvønn annan av, áðrenn tey í fimta setti samdust um at nú skuldi tað gerast heilt spennandi hjá teimum umleið 200 áskoðarunum, sum vóru í høllini.

Fyrsta settið var ikki nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um so øgiligan spenning. TB legði bragdliga fyri, og áðrenn tær hjá Mjølni veruliga høvdu vant seg við umstøðurnar, so hevði TB tikið settið við 25-14. Av sonnum ein avsmurningur hjá Mjølni, men tær fullu ikki í fátt av teirri orsøk. Tvørtur ímóti tóku tær við 25-12 hevnd fyri fyrsta settið, og nú vóru tað tvørakvinnurnar, sum vóru mest sum fyri ongum.

Tær megnaðu tó at reisa seg aftur við einum 25-20 setti, men tá Mjølnir so tók fjórða settið á sama sannførandi hátt, sum tær tóku tað næsta, mundi eingin vera í iva um, hvør hevði sálarligu yvirvágina. Men tað var tó ikki nóg mikið hjá gestunum. TB gav seg alt tað, sum tær áttu, og við einum teprum 15-13 sigri tryggjaðu tær sær, at tað nú eru tær, sum standa við bestu kortunum í gullstríðnum.

Og spurningurin er so, hvørt nakað av hinum liðunum kann gera nakað, til tess at skapa størri spenning í deildini, ella um tað bara skal bíðast til seinna dystin millum tey bæði oddaliðini. Sum støðan er nú, so eru tær hjá TB tvey stig og seks sett framman fyri Mjølnir, men hetta er framvegis akkurát ikki nóg mikið til, at tær einsamallar kunnu avgera tað heila. Á pappírinum hevur Mjølnir nevnliga framvegis møguleikan at koma á sama stigatal og sama settmun, men tað krevur so, at tær ikki missa nakað sett, har TB ikki missur, og at tær í seinna dystinum taka sær ein 3-0 sigur.

### Dráttur kann órógva

Skal nakar órógva tey bæði oddaliðini, so má tað helst roknast við, at Dráttur eru tær, sum liggja næstar í hesum.

Sum vinnarar av Mjølnir kappingini hava tær í øllum førum vunnið sær rætt til luttøku í steypafinaluni, og so er spurningurin, hvørt tær aftur kunnu gera nakað við Mjølnir, tá liðini hittast um góða viku.

Hesa ferð hevi Dráttur heimadyst móti KÍF, har var eingin sum helst ivi um úrslitið. Dráttur vann ein tryggan 3-0 sigur, har kollfjarðakvinnurnar einans fingu 36 bóltar, og tá verður av álvara tosað um at fáa bank í flogbólti.

Eisini ÍF vann tryggan sigur, tá tær á heimavølli tóku móti Fleyr, sum er at kalla avbyrgt í botninum. 3-0 gjørdist úrslitið, og hesum kundu tær hjá ÍF saman við Drátti toga seg upp um KÍF, sum fyrsta partin av grundspælinum gjørdi nógv um seg.

# Holte misti og Lyngby vann

**Skiftandi lagnu í næstbestu donsku flogbóltsdeildini, har fleiri føroyskir leikarar royna seg**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit so ofta hava nevnt tað fyrr, so er danska Holte IF í ár í eini skiftistíð, har stórur partur av steypavinnandi liðnum frá í fjør er farin úr felagnum.

Hetta viðførdi millum annað, at felagði í ár noyðist at spæla í elitu-kval røðini um rættin til at taka lut í bestu deildini næsta ár.

Her hevði Holte um vikuskiftið vitjan av Hvidovre VK, og fyri heimaliðið gjørdist talan um ein alt annað enn minniligan dag.

»Katastrofal indsats« var yvirskriftin á heimasíðu felagsins, og tað mundi svíða hart, at gestirnir sluppu avstað við einum 3-2 sigri. Ikki minst eftir at Holte hevði tikið sær leikandi lætt av fyrsta settinum.

Holte fór við tapinum niður um strikuna, sum gevur rætt til eliturøðina komandi ár, men enn eru átta dystir eftir, so góðir møguleikar eru at broyta um støðuna.

Hjá Steinari Eirikstoft og Suna Juul Pedersen, sum spæla við PVC Lyngby, gekst hinvegin nakað betri. Teir vóru á vitjan hjá Århus 1900, og her eydnaðist Lyngby at vinna ein sera spenandi fimm-settara. Føroysku útisetarnir hava við hesum lagt seg á odda í bólkti 2 í elitu-kval røðini, og so er spurningurin, hvørt felagið megnar at halda fast um hesa støðuna. Í øllum førum vildi tað verið stak hugaligt fyri føroyskan flogbólt, um vit komandi kappingarár kundu havt fýra leikarar í bestu donsku røðini, men tað er so ein spurningur, sum ikki verður svaraður, fyrr enn allir dystirnir á árinum eru leiktir.

# ÍF og Sí gjørdu sínar skyldur

**Fuglfirðingar og sørvingar vunnu á ávíkavist Fleyr og Fram**

Tað var ikki annað enn væntað at ÍF vann á Fleyr á Kambsdali sunnudagin.

Fleyr kom norður á Kambsdal við ongum stigi, meðan fuglfirðingar stríðast við Mjøln og partvíst SÍ um FM-heitið.

ÍF lat ongan iva verða um, hvør tað betra liðið var sunnudagin. Úrslitið gjørdist ein greiður 3-0 sigur til ÍF. Fleyr megnaði ongantíð at hótta ÍF.

Fyrsta sett vunnu fuglfirðingar 25-13. Annað sett vann ÍF 25-12. Í triðja setti fekk ÍF meira mótstøðu, men settið og sigurin var ongantíð í vanda, settið endaði 25-19.

ÍF er nýtt oddalið í meistaradeildini hjá monnum við 9 stigum, tað er tvey meira enn Mjølnir , men tó hevur ÍF leikt ein dyst meir enn Mjølnir, meðan Fleyr hinvegin enn hevur fyrstu stigini tilgóðar hettar kappingarárið.

SÍ hevur staðið seg væl í seinastuni og seinasta vikukiftið vann liðið Mjølnirkappingina. Sunnudagin hevði SÍ vitjan av botnliðinum Fram. SÍ, sum er ein av outseidarunum til FM-heitið, vann sera sannførandi 3-0. Fyrsta og annað sett vóru sera lík, og við SÍ sum vinnara, settuni endaði 25-19, 25-18 til SÍ. Triðja sett vunnu sørvingar sannførandi 25-9. SÍ eru við sigrinum framvegis á triðja plássi við 6 stigum.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 11 | 9 | - | 2 | 30 | 9 | 21 | 10 |
| 2 Mjølnir | 11 | 8 | - | 3 | 27 | 12 | 15 | 8 |
| 3 Dráttur | 11 | 5 | - | 6 | 21 | 21 | 0 | 6 |
| 4 ÍF | 11 | 5 | - | 6 | 16 | 19 | -3 | 6 |
| 5 KÍF | 11 | 5 | - | 6 | 17 | 25 | -8 | 5 |
| 6 Fleyr | 11 | 1 | - | 10 | 7 | 32 | -25 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 9 | 8 | - | 1 | 24 | 5 | 19 | 9 |
| 2 Mjølnir | 8 | 7 | - | 1 | 21 | 4 | 17 | 7 |
| 3 SÍ | 9 | 5 | - | 4 | 17 | 14 | 3 | 6 |
| 4 Fram | 9 | 2 | - | 7 | 8 | 22 | -14 | 2 |
| 5 Fleyr | 9 | 0 | - | 9 | 2 | 27 | -25 | 0 |

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
TB-Mjølnir 3-2 (25-14, 12-25, 25-20, 25-13, 15-13)
Dráttur-KÍF 3-0 (25-13, 25-9, 25-14)
ÍF-Fleyr 3-0 (25-23, 25-20, 25-17)

**Meistaradeild menn**
ÍF-Fleyr 3-0 (25-13, 25-12, 25-19)
SÍ-Fram 3-0 (25-19, 25-18, 25-9)



VIÐMERKINGAR

# Javnaðarleiðslan

**Mannbjørn Jacobsen**
*14. januar 2004*



Ein óheilag samansjóðing verður í bløðunum framførd at vera javnaðarleiðslan. Tað er ikki formliga leiðslan, vald í formligu valdssessirnir, so nógv, meiri at líkna við eina strategiska leiðslu. Ein, sum er snild til at geva flokkinum eitt gott val, góða støðu í samráðingunum aftaná eitt val. Ikki so at henda leiðsla eygsjónliga er ein slík, samansett av ósameiniligum bólkum í flokkinum, sum hon er, umboðandi flokstólið (formaðurin), nýggj stjórnuskot (annar næstformaðurin) í flokkinum, sum ongin hevur hoyrt um fyrr, og so fólk, sum týðiliga hava heilt aðra útviklings bakgrund, ikki ókend í politiska spektrunum, men á heilt øðrum stað, á ytsta vinstravongi í 1970/80 árunum.

Inn gjøgnum bakdyrnar mugu hesi vera komin, uttan sjónligt politiskt skifti i hugmyndafrøðiligum tilknýti.

Tveir limir har B.Dam oh H.P. Strøm eru fyrrverandi formenn og blaðformenn í moskva sinnaða felagsskapinum FS (Føroyskir Sosialistar). B.D. limur í DKU (ungkommunistunum hjá DKP). Teir gjørdu seg í áravís til talsmenn fyri altjóða sjónarmiðunum hjá Sovjetsamveldinum í friðar og avdubbingar spurningin-um.

Í felagsblaðnum Framanum gjørdu teir seg í hesum sambandi til talsmenn fyri »proletarisku internasjunalismuni«, sum av øllum varð tulkað sum undirlegging undir Sovjetsamveldið, skipanarliga og politiskt, bæði í heimligum og altjóða høpi.

Henda kjarna, nú í javnaðarleiðsluni, hevur ongantíð greitt frá, ella sagt frá, hesi fortíð síni, hóast tað meir enn einaferð er komið inn á í bløðunum, onki svar.

Hetta tilknýti er ikki bara nevnt sum ein tingað áhugaverdan upplýsning í dag, nógv ár aftaná.

Meiri náhvamt varð farið fram.

Nakrar fyri mær enn ikki heilt uppkláraðar hendingar í lestrartíð míni fyrst í 1980 árunum, har eg fekk lestur mín avbrotnan av órógv og støðugum løgnum útsløgum, fyribrigdum, illtonki eg fólk í FS, at standa aftanfyri. Beinleiðis orsøkin er flutningsverkfallið tá (1981), har hesir stóðu á síðuni hjá Óla Jacobsen, eg súmpatiseraði við hinari síðuni. Mest hugsandi var tað beinleiðis orsøkin. Beinleiðis var uppgerð í FS orsøkin, har eg í einum bólki varð strikaður sum limur, fyri ikki at fylgja moskvasinnaðu linju teirra í friðarpolitikkinum.

Atsóknin móti mær á lestrarstaði mínum (Regensen) var ikki tilvildarligt tvætl, innibar roynd saman við dønum har, sjálvum bústjóranum (próstinum) ma., at fáa meg beindan av vegnum við brúki av sjúkrahúsum, har løgreglan varð tilkallað.

Hetta eydnaðist ikki, harav kreppan í hesum máli.

Ein annar felagskapur, skipaður tá (1977) sum beinleiðis fylgja av ósemjuni, har eg luttók, Komm.Ú., (breiðari vinstravongs felagsskapur) hava hesi undirstungið (korumperað) á sína síðu við lokkilsi í leiðsluarbeiðum og annað arbeiði í javnaðarflokkinum. Hesi hava ikki upprunaliga luttikið í atsóknum móti mær, men muga sigast tað nú, aftaná aftur, tá tey á henda hátt bara lima seg inn í javnaðarflokkin. Fólk harfrá trýna eisini seinni fram í Javnaðarflokkinum, eru við í nevndu politisku leiðslu.

Við grundarlagi í hesum framførda vil eg mæla frá, at velja hesi til løgtingsvalið nú, eisini mæla frá, at tey sita í leiðslu javnaðarflokksins.

Um hesi fyri fyrstu ferð í 20 ár vilja tosa við meg um nevndu hendingar, ymiskt har umkring, á ein hampuligan máta, kann eg kanska koma til at síggja eitt sindur annaðleiðis uppá tað, ikki sum er.

# Eg kenni mína samfelagsskyldu

**Hans Birgir Hansen**
*Samfelagsrevsari úr Havnini*



Tað er einki sum eitur, at vit liva í einum demokratiskum og fólkaræðisligum samfelag, tá vit hava dikatur, fasismu og hernaðar, politistatir, í einum størri stati, við valdsharrum.

Arbeiðandi fólki, úti í ali, fiski- og útróðrarvinnu, og í fiskaídnaðinum hava fleiri hóttanir hangandi yvir sínum høvdi. Í FAG, við óskipaðum arbeiðsgevarum, skipa fyri um landi.

Tað er óhugnaligt at hugsa sær, at tað skal kosta tí arbeiðandi verkafólki, at siga sína meining við arbeiðsgevarar, ið hótta føroyska verkafólki, við at siga hesi úr sínum arbeiði.

Hetta er ein óvreingjandi veruleiki, og FAG, við ískipaðum arbeiðsgevarum nýtir útlendsku arbeiðsmegi at leggja eitt stórt trýst á arbeiðandi verkafólki, hvat vit síggja í Skálavík. Tað er ikki bert á hesum virkinum, í Skálavík, vit síggja útlendingar hava arbeiðir, men á fleiri øðrum fiskavirkjum, og innanfyri skipa- og maskinídnaðin og fleiri aðrar vinnur.

Tað er einki dulsmál, at FAG við óskipaðm arbeiðsgevarum, vil hava lønarlagið og kostnaðarstøði niður, við at leggja eitt trýst á føroyska verkafólki í limafeløgum F.A.

Tað er nógv fyri at vit skulu uppliva føroyingar hjúkla um og sleikja fyri øllum útlendingum í Føroyum, ið gevur mær í dag andstygd, slíkt kallar ein landasvíkjarar, quislingar.

Livikostnaðarstøði og lønarlagið í teimum londum, hvørs útlendingar, koma frá, fleiri longum í ES samveldinum og uttanfyri kann ikki sammetast við tað saman í Føroyum í dag.

Vit skulu síggja í eyguni, at útlendingar koma at skapa okkum somu trupulleikar sum í Norðurlondum og europeiskum londum, í Føroya Arbeiðsgevarafelag leggur støði undir.

Tað er ikki uppgáva »Ítróttafeløgum«, at útvega FAG við óskipaðum arbeiðsgevarum, útlendsa arbeiðsmegi úr fleiri londum, vit síggja hava etablera seg í útjaðaraoyggjunum.

Vit koma við stórum tali av innfluttari, útlendskari arbeiðsmegi, við familjum, at leggja fótin fyri føroyingar ið vilja leita heim aftur til Føroyar eftir lokna útbúgving og avlærd.

Vit eiga at fáa útlendingar kunnaði um føroyskar løggávur, skipanir, lóg og rætt og landaskil og mál og mentan og siðir, skulu hesir vera partur av tí føroyska samfelagnum í dag.

Eg kenni mína samfelagsskyldu at fáa alt fram í røttum samanhangi, tá ið ein kann spáða um framtíðarúrslitini ið eru gingin út síðan ein av fyrstan tíð byrjaði at skriva lesarabrøv.

## Sandvíkssangurin

*Lag: Højt over fjellet*

Sandvík gitin í søguni er,
Torgrímur Illi búði her,
Sigmundi Brestisson at bana er,
tá hann um fjørðin svam.

*Niðurlag:*
Sandvík, mín heimbygd, kær tú mær er,
prúðasta bygd í Føroyum tú er,
gitin tú er um landið alt,
aldrin tú gloymast skalt.

Navnið tú bert av sandinum
størstur hann er í landinum
breiðir seg djúpt í dalin inn,
fjøllini standa so svinn.

Borgin hægsta fjallið er,
hagani frá gott útsýni er,
Lítlu Dímun kanst tú sjá,
lítir inn á sandvíksvág.

Tvørgjógv seg inn í landið sker,
ikki bara góð minnir hon ber,
nýggju hon at bana var,
neytakonur vóru tær.

Ásmundarstakkur eitt prýði er,
túsundtalsfuglar hann á sær ber,
maður ein gjørdi roysni har,
Hanus úr Dímun tað var.

Bøin so slættan vit hava sum fá,
øll tey undrast, ið hann hava sjá,
um heystið sáturnar standa her,
skjól fyri pørini er.

Hol seg eitt gjøgnum fjallið sker,
samferðslu góða tað við sær ber,
meiri ófriðaligt tað nú er,
øll mugu sanna her.

Kvøðan til Sandvík nú endar her,
hóast mangt annað at siga er,
tó vit øll kunnu einast um,
at Sandvík av øllum ber.

# »Research« seldur til Kroatia

**Tíðindaskriv**

Marknaðurin fyri brúkt skip er vánaligur, so tað er trupult at sleppa av við gomlu føroysku fiskiskipini fyri tíðina, men av og á fer okkurt av teimum til lond, sum liggja langt frá okkum, men fyri lágar prísir, tí útboðið er so stórt.

Í vikuni varð »Research« seldur til Kroatia.

Trolarin er upprunaliga bygdur á Campletown skipasmiðjuni í Bretlandi í 1979 og longdur í Skagen, 1984.

»Research« og »Skansatangi« fóru úr ferskfiskaflotanum, tá ið eigarin keypti »Kallsevni« og »Grímur Kamban« úr Íslandi.

Tað er Tor Shipping í Havn, sum hevur staðið fyri søluni av »Research« og har verður upplýst, at teir hava stórt úrval av skipum til sølu.